# eiðkonsert



Ungar gentur leiktu drama til ein sang hjá barnakórinum

sangir. Sera fjølbroyt sangval og sostatt var tað nakað fyri allar aldursbólkar. Solistarnir kláraðu seg eisini sera væl. Har vóru nøkur óskrivað bløð, sum ikki hava roynt seg ofta fyrr sum solistar, men tey stóðu einki aftanfyri tey meira royndu. Beint tá ið kórið hevði sungið síðsta sangin, og áhoyrararnir klappaðu til eykanummar, fór streymurin í høllini. Teknikkarnir tustu runt fyri at fáa tað ordnað. Tað ljóðaði, at ein høvuðssikring var farin. Kórið loftaði tó óhepnu støðuna væl, tá ið tey byrjaðu at syngja fest títt eyga á Jesus, og áhoyrararnir tóku undir. Hetta var ein vøkur løta, har ið stearinljósini í høllini veruliga komu til sín rætt í myrku høllini. Tað var eisini rættiliga súmbolskt við ljósi í myrkri.

### Fyrireika næsta sangskeið

Súni Olsen úr Rituvík er við í sang og tónleikanevndini hjá Heimamissiónin, sum skipar fyri sangskeiðnum. Hann er sera væl nøgdur við konsertina.

– Vit meta, at tað vóru um 700 fólk til konsert. Vit eru stak væl nøgd við tiltakið og sera takksom um, at undirtøkan var so stór.

Súni sigur, at sangnevndin er longu byrjað at fyrireika sangskeiðið næsta ár:

– Vit hava fingið kórleiðara til næsta ár. Talan er um Maud Kofoed úr Danmark, sum er leiðari í kórinum "Vocation".

Samanumtikið ein góð konsert, og vit síggja fram til konsertina næsta ár.



Kórið sang millum annað kenda sangin »Shackles«. Har sungu Sóley Jacobsen og Elly Mikkelsen solo





Barnakórið í ár var eitt av teimum betru

